## VIÐMERKINGAR

# Teoretiskt slutur frá Búskaparráðnum

**Jóannes Martin Hansen**



Í Sosialinum tann 29. nov. er grein um niðurstøðurnar í eini frágreiðing, sum Búskaparráðið hevur gjørt um búskaparstøðuna í Føroyum í dag.

Um Herman Oskarsson er rætt endugivin av Øssuri Winthereig, so er í stuttum niðurstøðan hendan:

Landskassin skal ikki stuðla kreppuraktum vinnum, soleiðis at skilja, at konkursreglarnar í útflutningsvinnuni verða settar úr gildi við almennum stuðuli Einans rentabiliteturin hjá vinnuni skal avgera, um útflutningsvinnan skal yvirliva ella doyggja.

Tað er heilt óskiljandi, at búskaparfrøðingar í almennum størvum kunnu sita og staðfesta sovorðið tvætl, sum ikki hevur nakað fótafesti í tí verunliga búskaparumhvørvinum, sum Føroyar jú eru ein partur av. Niðurstøðurnar bera týðulig brá av teoretiskari lummafilosofi og eru ikki grundaðar á tær reglur, sum eru á altjóða marknaðinum fyri matvørur í dag. Her er tað jú, vit sum útflutningstjóð fáa okkara vælferð frá .

**Føroyski útflutningurin og kappingarneytar:**

Hvørt mansbarn í Føroyum veit, at Føroyar hava sonevndan monoexport. Tað er bert fiskivinnan og fiskavørur, sum skapa inntøkur inn til landið í útflutningskrónum.

Altjóða marknaðurin fyri fiskavørur er serstakliga skiftandi. À okkara høvuðmarknaðum hevur tað verið búskaparlig niðurgongd, og keypiorkan hevur verið á lægri støði til at gjalda fyri 1. floks føroyskan fisk samanborið við fiskavørur, sum í dag floyma marknaðin. Hesar vørur koma eitt nú úr Kina, men eisini úr Suðuramerikur, Baltalondum og Pólandi, har tímalønin er millum nakað og onki samanborið við ta føroysku. Saman við stórum fallið í USD, sum er gjaldoyra hesu lond nýta mest til útflutning, er prísurin á bæði feskum og frystum botnfiskasløgum rapladur samanborið við undanfarin ár.

Flakavinnan og fiskavirkir í Føroyum hevur spílað seg út fyri at klára kappingina við hesar nýggju veitarar, sum hava allar fyrimunir, hvat løn og rakstrarútreiðslur viðvíkja. M.a. eru íløgur gjørdar í nýmótans tøkni, sum kann vera við til at gera okkum enn betur kappingarfør.

Flakavinnan og fiskavirkir í síni heild, eru í dag hornasteinurin undir útjaðaranum í Føroyum. Samb. heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum rindar føroyska flakavinnan og fiskavirkir uml DKK 300 milliónir út í lønum um árið. Hetta kom fram, tá ið verkfallið var fyrr í ár.

Okkara kappingarneytar í EU fáa stuðul í høvd og reyv. Undirritaði var við til at stovna fyritøku í Danmark, har vit fingu 30% íløgustuðul til útgerð sum flakalinjur. Harafturat stuðlar EU øllum so ella so, sum hevur til endamáls at skapa fólki arbeiði - serstakliga í útjaðaranum. Her er Skotland fremsta dømi, har føroysk flakavirkir hvønn dag mugu kappast við eitt nú skotskar keyparar um rávøruna, sum Løgtingið hevur veitt bátum og skipum fyri onki.

Tað er sera lætt at sita í Albert Hall og staðfesta, at um tað frysta ikki ber seg, ja so má tað feska vera betur. Um tað frysta er ringt í løtuni, ja so er feskfiskamarknaðurin enn verri. Feskfiskamarknaðurin klárar ikki at taka nøgdirnar, uttan at marknaðurin brennur saman. Her hevur flakavinnan á landi so tann leiklut, at teir kunnu taka rávøru hvørja viku og framleiða bæði feskt, saltað og fryst. Um tað ikki var, ja so fingu bátar og skip so slett ongan prís. Hetta hevur ein best sæð, tá ið verkfall hava verið í Føroyum.

Grundað á omanfyristandandi er tað lítið høpi í at siga, at marknaðurin er Gud, um tað skal skiljast soleiðis, at ongin almenn króna skal í vinnuna. Eitt nú skotar og onglendingar keypa rávøruna undan okkum, av tí at teir eru betri kappingarførir við tí stuðuli teir fáa úr EU og ensku stjórnini. Er marknaðurin tá Gud? Harra Heman Oskarsson! Marknaðurin fyri matvørur, har føroysk virkir kappast við eitt nú EU-veitarar, er undirdíktur í stuðuli, men í Føroyum fær ein ikki krónuna. Um hetta er kapping á jøvnum føti, ja so má tað vera á Búskaparráðnum, at henda teori hevur sæð dagsins ljós.

Tá ið so Búskaparráðið staðfestir, at um so er, at virkir fara av knóranum, so kann tað almenna stimbra heimamarknaðin. Àlvaratos! Er tað ikki betur at stimbra eftirspurninginum eftir vørum og tænastum á heimamarknaðinum við at lata fólk vinna krónurnar á einum virki í útflutningsvinnuni, enn at hækka útgjaldið frá ALS??

**Búskaparteoriir og stuðul til fiskivinnuna**

Tað er ein royndur lutur, at tað er sera trupult at nýta búskaparteoriir til fiskivinnu á landi og sjógvi. Fyritreytirnar fyri útrokningum broytast allatíðina - ja frá degi til dags.

Herman veit uttan iva, at ein kann fáa alt at ganga upp á pappírinum. Tað er bert ein spurningur, um hvørjar búskaparfyritreytir tú brúkar til útrokningarnar. Hetta er neyvan broytt, frá tí eg las búskaparfrøði í seinnu helvt av 80´unum

Rentabilitetur hjá eitt nú fiskavirkjum hevur sjáldan skarað framúr, um ein samanber hesa vinnuna við so mangar aðrar vinnur. Tí er tað ser ringt at lata rentabilitetin vera einasta faktor, ið skal avgera, um eitt virki skal yvirliva ella vera avhøvdað. Eitt nú lánveitarar vilja avgjørt taka aðrar faktorar inn í myndina, sum t.d. húsamarknaðin. Um virkið fer av knóranum í eini miðalstórari føroyskari bygd, ja so vera so og so nógv arbeiðsleys, og hetta kemur so at ávirka orkuna til at gjalda t.d. húsalán aftur við.

Fyritreytirnar fyri at veita stuðul til eitt nú flutning av rávøru til fiskavirkir í útjaðaranum ella at lata rækjuvinnuna fáa eina FAS-skipan, skal verða givin, um útbýtið til land og fólk verður størri enn latið verður. Samstundis skal stuðulin ikki økja eftirspurningin eftir vørum og tænastum á heimamarknaðinum í sovorði mát, at handilsjavni og prísir fara skeivan veg. Eru hesar fyritreytir í lagi, hvat er so skeivt við at lata stuðul, tá ið landskassin fær meira innaftur??

Búskaparráðið sigur beinleiðis, at tað ber ikki til at lata stuðul í eini tillagingartíð. Alt skal heldur fara av knóranum. Hetta er ein heilt ótrúligur hugburður. Tað er betur at lata alla rækjuvinnuna fara og onga skatta- og útflutningskrónu fáa frá hesu vinnu, enn at t.d. góðtaka ein FAS-skipan, har so landskassin fær hóast alt nakrar skattakrónur. Harafturat útflutningin av rækjunum, sum viga positivt á handilsjavnanum.

Eg havi selt føroyskar fiskaúrdráttir, bæði frá virkjum og bátum, síðani 1991. Sostatt kenni eg nógvar garpar, sum reka fiskivinnuna í dag - bæði á sjógvi og landi. Tað er ongin av hesum vinnulívsmonnum, sum vilja fara biddargongd út í Tinganes. Tað einasta biðið verður um er, at í eini tillagingartíð sleppa bíligari í rakstri, ella hjá útjaðarnum at fáa flutningsstuðul, so at ein hevur somu kappingarfyritreytir í Vági og Norðdepli sum í miðstaðarøkinum.

À henda hátt fær landskassin skattainntøkur frá verkafólkinum, partafelagsskatt, og ein betri handilsjavna við tí útflutningi, sum stuðulin er við til skapa.

Um øll fiskavirkini stongdi, harra Herman Oskarsson, ja so stongdi bæði Búskaparráð og Hagdeild við. Útjaðarin føðir og klæðir almennu umsitingina í Havn, sum ikki skapar eina útflutningskrónu til landið. Hetta er kanska heldur ikki uppgávan hjá almennu umsitingini, kann ein so siga.

Hin vegin eri eg neyvan tann einasti í landinum, sum undrast, and ein kann fáa løn fyri at seta sovorðnar niðurstøður á prent. Um vinnan øll fer á heysin, sum tað hendi fyri 11 árum síðani, hvar skulu so land og fólk fá sína útkomu frá, harra Herman Oskarsson? Kanska eitt sindur hypotetiskur spurningur, sum í tykkara teoretiska umhvørvi uttan iva kann skapa nógv høvuðbrýggj. Livst so spyrst.

Argir, tann 30.nov. 2003

# Bygdarmenningarpolitikkur í Føroyum

**Hans B. Hansen**

Eg eri fyri at skapa veruliga bygdarmenning við at fáa skipað partar av almenna, lands, privatu, ríkis, umsitingum, skrivstovu og serfrøðingaveldir úti í teim størru kommununum, oyggjunum, sí niðanfyri!

Skula vit skapa bygdamenning, skula vit broyta bygnaðin hjá tí almenna, landi, privata, ríki ið bert skula hava høvuðssæti í Havnini/Suðurstreymoy, og fáa stovna deildir, eindir, úti í størru kommununum! Tað at fremja býti ímillum almenna, landi, kommunur, er ein liður í at skapa bygdarmenning. Eg haldi at peningurin skal fylgja við brúkaranum, børnum, ungfólki, eldri fólki ið skula virka á bygd og í bý!

Tær galdandi lóggávur, skipanir, mannagongdir, kunn- og reglugerðir innan fyri áðurnevndu umsitingar eru av donskum, fremm-



andum uppruna, ið eiga at vera politiskt endurskoðaðar og dagførdar sum skjótast! Vit skula avtaka allan valdsavgerðarrætt á fáum hondum og leggja slíkan út til vanliga arbeiðandi verkafólkið úti á bygd og í bý, skilja allir blaðlesarar tað, ið fleiri ferðir um vikuna, lesa føroysku bløðini!

Vit skula avtaka lóggávur, skipanir, mannagongdir, kunn- og reglugerðir, við diktatur, facismu og hernaðar- og politistatum í einum størri stati, við bureauukrati, formyndarí, stovnsveldi, ið vit hava ídag! Vit kunna ikki skriva, og tosa um demokrati, fólkaræði, stýri, bygdarmenning við áðurnevndum fortreytum, grundarlagið ið bleiv innført og skapt fyrst í sjeytiárunum av landsstýrinum ið framdi sparingar!

Eg havi einfalt og lætt við at gjøgnumskoðað alt og øll í einum størri samanhangi, og vísa á hvussu órættvíst alt og øll eru skipað, hvat ið ein ger vart við í hvøssu atfinningunum í lesarabrøvum í bløðunum!

Henda miðspjaðing á øllum økjum skal skapa framburð, trivna og menning av lokalu samfeløgunum úti í útjaðaraoyggjunum og á útoyggjum, so fólkið kann støðast í heimstaðarkommununum, skilja tit tað! Vit skula venda tí skeivu búskaparligu og samfelagsligu gongdini tann øvugta vegin, so vit sleppa av við øll avbygdar, býarfólk, ið hvønn morgun og kvøld ferðast til og frá Havnini/Suðurstreymoy! Vit skula hava stongt undirsjóvartunnilin og kollafjarðartunnilin á náttartíð, so tað slepst undan øllum ólevnað og rukkukoyring úr Vágoy, Norðurstreymoy, Eysturoy, til Havnar hvørt tað einasta vikuskifti!

Vit eiga at skipa flutnings, tænastu og ídnaðarvinnur og mentan og list og lestrar, læru og frítíðarmøguleikar uttan fyri Havnina/Suðurstreymoy, við at broyta grundleggjandi strukturin ídag! Vit skula steðga allari tí privatu ferðsluni ígjøgnum Kollafjarðartunnilin og av Gomlurætt og tá ið Smyril kemur úr Suðuroy, so slepst undan av slíta lands og kommunalu vegakervini hjá okkum ídag!

Vit skula steðga allari tilflytan til Havnina/Suðurstreymoy og fáa alt avbygdar, býarfólki at flyta út aftur til heimstaðarkommunurnar, so teimum verður lív lagað, til at kunna føra lokalu samfeløgini víðari!

Eg vil javnan koma at draga saman um skrivaða í lesarabrøvum, í føroysku bløðunum og lyfta upp vitanarstøðið hjá teim ið fylgja við einum, ið eg fari at samskifta við um mangt og hvat her í Havnini!

## Rætting

Í grein í blaðnum í síðstu viku skrivaðu vit, at Teitur hevur konsert í Norðurlandahúsinum tann 6. desember í sambandi við útbúgvingarráðstevnuna Markleys Útbúgving. Hetta er tó ikki heilt rætt.

Teitur hevur konsert í Norðurlandahúsinum bæði fríggjakvøldið 5. desember og leygardagin tann 6. desember. Fríggjakvøldið spælir hann í sambandi við útbúgvingarráðstevnuna, og har verða eisini aðrir tónleikarar at hoyra.

Leygarkvøldið 6. desember klokkan 19.30 hevur hann einsamallur á palli.

Vit biðja lesararnar umbera okkum mistakið.

**- ingrid**

# Hvussu væl kennir tú bíbliuna?

## Jólakapping fyri børn upp til 17 ár

Nú jólini standa fyri durum, fara vit á Sosialinum undir eina kapping við spurningum til børn og ung upp til 17 ár um mangt og hvat í Gamla og Nýggja Testamenti.

Vit byrja í dag hósdag 4. desember við sjey spurningum. Teir skulu øll tit, ið vilja vera við í kappingini, klippa út, svara, skriva navn, bústað, tel. og aldur á, og goyma. Tað sama skulu tit gera við spurningarnar, vit hava til tykkara í hvørjum Sosiali til og við mikudag 17. desember, tá kappingin endar.

Allir spurningarnir í kappingini eru ikki líka lættir at svara. Tá kunnu tit til dømis fara í bíbliusøgurnar, tit lesa ella hava lisið í skúlanum at finna svarini. Ella hví ikki spyrja tey tilkomnu í húsinum! Í telduni ber eisini til at leita eftir svarum.

Leparnar, tit hava klipt út og goymt *(við spurningum, svarum, navnið, bústaði, tel. og aldri)* skulu tit senda Sosialinum í seinasta lagi leygardagin 20. desember. Í brævbjálvanum til okkara skal sama navn standa á øllum lepum. Uttaná skal standa "Jólakapping 2003", navn á luttakara og bústaður. Tit, ið tá hava sent allar lepar inn og svarað rætt, verða við í lutakasti um fýra virðislønir.

Við vón um undirtøku frá hópin av børnum og ungum um alt Føroya land, ynskja vit øllum ein góðan jólamánað.

HESTPRENT · TEL. 314 555

VINNINGAR:

1. Vinningur:

**Vikuskiftisferð fyri tvey til Íslands**

ATLANTIC AIRWAYS



Blue Lagoon




**MAUD HEINESEN**
Stoffalág 18 • 100 Tórshavn
maud.heinesen@kallnet.fo • Telefon 312 601

Hugskotið til Jólakappingina í Sosialinum eigur Maud Heinesen. Tað er eisini hon, sum hevur gjørt spurningarnar. Sjálv greiðir hon soleiðis frá:

Tá ið eg setti meg niður at skriva hesar spurningarnar, sum eru við í jólakappingini, vóru teir einans ætlaðir til ein jólakalendara hjá ommudóttur míni, Helenu, sum býr í Danmark.

Í fjør vetur var hon heima hjá okkum nakrar mánaðir og gekk eisini í skúla her. Hon hevur altíð fingið jólakalendara frá mær, oftast av teimum vanligu, sum børn fáa. Í fjør helt eg, hann skuldi vera nakað serligt. Eg valdi ymisk evni, sum tey læra um í skúlanum - eini 7-8 í tali, og til hvørt evni gjørdi eg fleiri spurningar. Innan fyri hvørja lúku í kalendaranum stóð evnið, t.d. bíbliusøga, søga, landalæra, lívfrøði, bókmentir, rokning. Spurningarnir til evnini hevði eg ein og ein á lepum, sum hon kundi trekkja. Fyri hvørt rætt svar fekk hon stig, sum vit settu á eitt skema at gera upp jólaaftan. Tað ráddi um at fáa so nógv stig sum gjørligt, tí hvørt stig gav nakrar krónur.

Vit høvdu stóra fragd av hesum, og tí vildi eg royna nøkurlunda tað sama í ár, men hesa ferð einans taka bíbliusøguna. Helena gongur nevniliga til prest og skal konfirmerast í vár.

Tá ið eg var næstan liðug við allar spurningarnar - 3 hvønn dag frá 1. til 24. desember - helt eg, at onnur børn og ung kundu havt áhuga fyri at svara teimum, t.d. í einari jólakapping, og spurdi Sosialin, hvat tey hildu. Har tóku tey beinanvegin undir við hugskoti mínum, og her byrjar so henda jólakappingin sum eitt slag av jólakalendara, tó ikki við 24 lúkum at lata upp, men í tíggju fylgjandi bløðum við sjey spurningum hvørja ferð.

## Hvussu væl kennir tú bíbliuna?

*Spurningar úr Gamla testamenti*

| Spurningar | Tykkara svar |
|---|---|
| 1 Hvussu æt urtagarðurin, har Adam og Eva búði, til Gud rak tey út, tí tey vóru ólýðin og ótu frukt av kunnleikans træi? | : |
| 2 Hvussu æt sonur Evu og Adam, sum drap bróður sín? | : |
| 3 Gud bað Nóa byggja eitt stórt skip til fólk og dýr, sum Gud vildi skuldu liva, eftir hann hann hevði latið tað regna, líka til øll jørðin stóð undir í vatni? Hvussu kallast skipið? | : |
| 4 Nóa hevði tríggjar synir við umborð á skipið, sum skuldi bjarga hansara fólki og flestu dýrum frá at týnast í vatnflóðini, Gud sendi av himli. Ein sonur æt Sem, ein annar Kam. Hvussu æt hin triðji? | : |
| 5 Vatnflóðin frá Gud, sum týndi næstan alt lív á jørðini, verður kallað syndaflóðin. Tá ið hon tók at minka, strandaði stóra skipið hjá Nóa á einum fjalli. Hvussu eitur tað fjallið? | : |
| 6 Eftir syndaflóðina setti Gud eitt tekin á luftina um, at jørðin ongantíð aftur skuldi ganga undir í vatni. Hvat er tað fyri tekin? | : |
| 7 Í Bíbliuni lesa vit, at meðan øll fólkini á jørðini tosaðu sama mál, ætlaðu tey at byggja eitt høgt torn, sum skuldi røkka til himmals. Tað vildi Gud ikki og blandaði málini. Hvussu æt tað tornið? | : |

**Navn á luttakara:** Bústaður:

**Telefon:** Aldur:

At klippa út og goyma, til kappingin endar 20. desember. Seinasta freist at senda Sosialin allar útkliptu leparnar við spurningum og svarum, navni á luttakara, bústaði, tel. og aldri, er leygardagin 20. desember. Uttan á brævbjálvanum skal standa Jólakapping 2003, umframt navn á luttakara og bústaður. Minnist til, at allir lepar í brævbjálvanum frá hvørjum einstøkum luttakara, skulu hava sama navn.

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
Tel. 341 800 • Fax 341 801